# Umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Bakkafrost Farming**<br>**Smoltstøð á Strond** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Bakkavegur 8, 625 Glyvrar | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Framleiðsla av smolti | |
| Aliloyvi.: | Staður: |
| S-21 | Matr. nr. 53c, 53h, 53i og 53k á Strond |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 15/00507 | 30. jan. 2018 |

Umhvørvisstovan, hin 30. jan. 2018

Suni Petersen, deildarleiðari /

Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

# 1. Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av smoltstøðini hjá P/F Bakkafrost Farming, á matr. nr. 53c, 53h, 53i og 53k á Strond, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Góðkenningin er givin til P/F Bakkafrost Farming, sum skal lúka tær treytir, sum eru nevndar í 6. parti, Góðkenningartreytir. Treytirnar eru galdandi fyri alt virksemi, sum er knýtt at smoltstøðini.

Í sambandi við nevndu treytir, eru nevnd ymisk tiltøk, sum skulu gerast av felagnum fyri at tryggja, at umhvørvið verður ávirkað so lítið sum gjørligt av virkseminum, sum henda góðkenning fevnir um.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

# 2. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk hin 5. nov. 2015 umsókn frá P/F Bakkafrost Farming, har søkt varð um umhvørvisgóðkenning til nýggja smoltstøð á Strond á Borðoynni. Við umsóknini var stutt lýsing av virkseminum og skitsa av smoltstøðini. 14. mars 2016 fekk Umhvørvisstovan dagførda umsókn saman við fyribils tekningum av smoltstøðini og økinum, har støðin skal byggjast.

Síðan hevur Umhvørvisstovan fleiri ferðir samskift við P/F Bakkafrost Farming um ymiskar tillagingar.

Ætlanin er, at smoltstøðin skal standa liðug við ársenda 2018.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

# 3. Viðgerð

Undir viðgerðini av umsóknini og í sambandi við at áseta treytir, er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn um umhvørvisgóðklenning við leypandi dagføringum
- Norðurlendsk BAT-frágreiðing um aling: *BAT for fiskeopdræt i norden*[1]
- Vegleiðing frá Miljøstyrelsen: *Ekstern støj fra virksomheder, vejledning nr.5/1984*

## 3.1. Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á,

- at skarn og fóðurrestir ikki skulu elva til upphópan av evnum og tilfari, til slóðir ella aðrar broytingar í umhvørvinum,
- at P/F Bakkafrost Farming hevur vælvirkandi innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar,
- at virkið áhaldandi arbeiðir fyri at skifta evni, ið verða brúkt í sambandi við virksemið, út við meira umhvørvisvinarlig evni,
- at umhvørvisdálkandi evni í minst møguligan mun verða leidd út í umhvørvið,

[1] BAT for fiskeopdræt i Norden, publikationsdato 25. april 2013.

- at virkið skal avmarka dálking mest møguligt við at nýta bestu tøku tøknina (BAT[2]),
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær ella at fiskur sleppur, skal minkast mest møguligt.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð hin 1. sept. 2017 sent P/F Bakkafrost Farming, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Klaksvíkar- og Kunoyar kommunum til viðmerkingar.

P/F Bakkafrost Farming viðmerkti:

1. part 3.1., at ístaðin fyri at skarn og fóðurrestir ikki verða leidd út ynskir P/F Bakafrost Farming, at ásetingin er, at útlát ikki skal elva til upphópan av tilfari út fyri útleiðingina.
2. Til part 6.2.2. at ynskiligt er, at mest loyvda framleiðsla verður sett út frá fóðurnýtsluni og ikki eftir fiskatali, tí tað kann vera ymiskt hvussu stórur fiskurin er. Mest loyvda fóðurnýtsla verður sett til 5000 tons árliga.
3. Til part. 6.5.8., at 1 vika er ov stutt tíð at gera eina ætlan við bøtandi atgerðum.

Umhvørvisstovan hevur tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar.

Klaksvíkar kommuna viðmerkti, at kommunan metir tað sum jaligt, at fáa spillivatn leitt út í Kalsoyarfjørð.

Kunoyar kommuna viðmerkti:

1. Ógreitt er hvussu útlátið frá smoltstøðini verður buturbeint.

   Umhvørvistovan hevur í treyt 6.3. sett eina freist til Bakkafrost Farming at senda okkum eina ætlan fyri hvar útleiðingin verður gjørd. Umhvørvisstovan skal góðkenna hesa ætlan áðrenn hon verður gjørd.

2. Til part 6.1.6., um virksemið heldur uppat skal tilfar og útgerð beinast burtur. P/F Bakkafrost Farming hevur ábyrgdina av at alt verður ruddað og skal eisini tryggja at upprunaliga umhvørvisstøðan verður endurskapað.

   Í treyt 6.1.7. er ásett, at um virksemið heldur uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av.

3. Til part 6.1.8., ynskir Kunoyar kommuna, at "kann Umhvørvisstovan" verður broytt til "skal Umhvørvisstovan".

   Umhvørvisstovan ***kann*** broyta treytirnar í hesi góðkenning, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram. Um tað er neyðugt at broyta treytirnar, fer Umhvørvisstovan at taka  avgerð um neyðugt er við eini broyting.

---

[2] **Best Available Techniques**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýstlu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

4. Til part 6.6.1. manglar, at nøgd av reingerðarevni og sóttreinsingarevni skal skrásetast.

Hetta er sett inn í treyt 6.6.1.

Kunoyar kommuna hevði fleiri aðrar viðmerkingar, sum Umhvørvisstovan annað hvørt ikki hevur mett vera viðkomandi ella ikki hevur heimild til at seta treytir um.

Umhvørvisstovan hoyrdi onki frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 4. Lýsing av virkseminum

Umhvørvisgóðkenningin umfatar alt virksemið, sum er knýtt at smoltstøðini.

Smoltstøðin er á matr. nr. 53c, 53h, 53i og 53k á Strond í Klaksvíkar kommunu. Sambært galdandi byggisamtykt fyri økið er tað lagt út sum øki B19, sum er vinnuøki.

P/F Bakkafrost Farming hevur upplýst at smoltstøðin skal framleiða áleið 5 mió. smolt á 500 g um árið. Hetta svarar til eina fóðurnýtslu upp á áleið 3.000 tons um árið. Støddin á fiskinum kann tó vera ymisk og kann fóðurnýtslan vera upp til 5000 tons. Øll framleiðsla verður innandura.

Smolt framleiðsla gevur m.a. nakað av fóðurspilli, $NH_3$ (ammoniak), $CO_2$ og skarni.

Nøgdin av feskum vatni er avmarkað, og tí verður vatnið, í størst møguligan mun endurnýtt. Fyri at kunna endurnýta vatnið, veður ein reinsiskipan sett upp, sum ger, at góð 99 % av vatninum kann endurnýtast. Hetta ger, at smoltstøðin hevur brúk fyri áleið 100 $m^3$ av nýggjum vatni um tíman.

Í umsóknini stendur m.a., at reinsiskipanin virkar soleiðis, at vatnið frá kørunum fyrst verður leitt ígjøgnum eitt trumlufiltur har slam, t.e. skarn og fóðurspill verður afturhildið. $O_2$ verður tilsett og vatnið verður síðan leitt ígjøgnum eitt biofiltur, sum ger $NH_3$ um til $NO_2$ og $NO_3$ . Eitt nitratfiltur tekur $NO_3$ úr vatninum, ið verður avgassað við ozon og síðan verður endurnýtt.

P/F Bakkafrost Farming hevur upplýst, at ætlanin er at gera eina spillivantsútleiðing yvir í Kalsoyarfjørð, har skarn og fóðurspill eisini kann leiðast út.

Størsti parturin av fiskinum, sum verður framleiddur á smoltstøðini, verður fluttur við brunnbáti út á aliøkini. Ætlanin er ikki, at brunnbátur skal leggja at kai, men skal liggja nakað uttanfyri. Ein leiðing verður gjørd, soleiðis at fiskurin verður pumpaður umborð. Bátur skal kunna liggja bæði sunnan fyri og norðan fyri byrgingina, tá hann heintar smolt.

Fiskur kann eisini flytast frá smoltstøðini við bili til aliøki.

## 5. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

### 5.1. Útlát til luft og vatn

Á flest øllum smoltstøðum í Føroyum hevur skarn og fóðurspill verið leitt beinleiðis á sjógv. Talan hevur verið um so smáar nøgdir av skarni og fóðurspilli, at tað ikki hevur verið mett sum ein trupulleiki. Talan er nú um eina smoltstøð, sum skal framleiða nógv størri smolt enn vanligt hevur verið í Føroyum og tí verður talan um eina størri nøgd av skarni og fóðurspilli, sum skulu leiðast út. Haraftrat verður smoltstøðin bygt við Haraldssund, og hevur p/f Bakkafrost Framing upplýst, at tað ikki

verður mett, at resipienturin er nóg sterkur til at móttaka og umseta so stórar nøgdir av skarni og fóðurspilli og kann hetta tí elva til upphópan á botni.

Mett verður, at áleið 15 – 20 % av fóðurnýtsluni verður gangnýtt av fiskinum, restin kemur út sum skarn. P/F Bakkafrost Farming væntar, at fóðurnýtslan verður í mesta lagi 5.000 tons um ári og tí væntast áleið 750 - 1000 tons av skarni. Harafturat verður nakað av fóðurspill.

Sambært spillivatnskunngerðini [3] skal spillivatn leiðast út á sjógv, har rákið førir spillivatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at tað ikki elvir til nakra upphópan av tilfari, til slóðir í sjónum ella aðrar broytingar í umhvørvinum.

P/F Bakkafrost Farming hevur upplýst, at enn er ikki nøkur endalig loysn funnin, hvat skal gerast við skarn, fóðurspill o.a., sum kemur frá virkseminum. Ein møguleiki er at leiða tað út beinleiðis á sjógv. Hetta metir P/F Bakkafrost Farming kann gerast við at leggja eina útleiðing ígjøgnum tunnilin yvir til Kalsoyarfjørð, har streymurin er nógvur. Tí verður mett, at útlátið ikki elvir til upphópan av tilfari í Kalsoyarfirði.

Sambært hugtakinum BAT[2] er best tøka tøknin, at skarn og fóðurspill verður afturhildið og gagnnýtt aðrastaðni, t.d. at nýta tað til at framleiða biogass. Sum er, finst ongin BAT loysn í Føroyum. P/F Bakkafrost Farming hevur upplýst, at teir møguleikar sum finnast í dag eru at leiða skarn og fóðurspill, saman við spillivatninum, óreinsað út á sjógv. Eisini kann tað leiðast ígjøgnum eitt filtur soleiðis, at skarn og fóðurspill verður hildið aftur og latið IRF, har tað verður brent.

P/F Bakkafrost Farming hevur mett, at av hesum møguleikum er tann skilabesta loysnin at leiða spillivatn, saman við skarni og fóðurspilli út í Kalsoyarfjørð. Virkið metir, at Kalsoyarfjørður er ein sterkur resipientur sum klárar at umseta tað lívrunna tilfarið, sum verður leitt út frá smoltstøðini.

Fyri at minka um útlátið frá fóðurspilli, verður treyt verður sett um, at fóðurfaktorurin skal vera so lágur sum møguligt. Sambært upplýsingum frá P/F Bakkafrost Farming er ein fóðurfaktor upp á 0,8 ílagi.

Treyt verður sett um, at P/F Bakkafrost Farming leypandi skal fylgja við, um nøkur loysn fyri skarn og fóðurspill er tøk at nýta ístaðin fyri at leiða skarn og fóðurspill út saman við spillivatninum. Umhvørvisstovan skal kunnast um loysnina, áðrenn hon kann setast í verk.

Treyt verður sett um, at so skjótt sum avgerð er tikin um hvat skal gerast við spillivatnið, skal P/F Bakkafrost Farming senda Umhvørvisstovnuni eina frágreiðing har greitt verður frá hvør loysn er funnin og hví hon er vald.

Kørini verða vaskað og sóttreinsað ímillum hvørt framleiðsluumfar. Vaskivatn verður eisini leitt beinleiðis í útleiðing.

Nakað av óljóði kann koma fyri. Serliga tá avskipað verður, bæði við brunnbáti ella bilum. Treyt verður sett um mest loyvda óljóð.

Nakað av lukti kann koma frá framleiðsluni, serliga frá skarni, sum verður hildið aftur. Treyt verður sett um, at virksemið ikki skal elva til luktampar.

[3] Kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn

### 5.2. Burturkast

Nakað av burturkasti er frá framleiðsluni. Treytir verða settar um, at alt burturkast skal skiljast og goymast í hóskandi íløtum, áðrenn tað verður latið móttakara við umhvørvisgóðkenning til at viðgera burturkast.

Lívrunnið burturkast, so sum deyður fiskur, verður malið og tilsett meyrusýru og síðani goymt í tanga, til tað verður latið Salmon Proteins á Eiði.

### 5.3. Innaneftirlit og umhvørvisstýring

Treyt verður sett um, at P/F Bakkafrost Farming skal hava eina umhvørvisstýrisskipan, sum m.a. fevnir um mál og niðurskrivaðar mannagongdir fyri smoltstøðina, fyri at ávirkanin á umhvørvið verður minst møgulig.

### 5.4. Yvirlit yvir ásettar freistir í treytunum sum eru settar í parti 6.

| Tiltak | Freist | Ávísing til treyt |
|---|---|---|
| Frágreiðing um staðseting av útleiðing | 1. apríl 2018 | 6.3.2. |
| Útleiðing gjørd | Áðrenn virksemið byrjar | 6.3.5. |
| Undankanning útfyri útleiðing | Áðrenn virksemið byrjar | 6.3.6. |
| Umhvørvisstyrisskipan við málum og niðurskrivaðum manngongdum | Áðrenn virksemið byrjar | 6.5.2. |
| Árlig kanning útfyri útleiðing | Seint á sumri á hvørjum ári | 6.3.7. |
| Árlig umhvørvisfrágreiðing | 1. apríl á hvørjum ári | 6.6.3. |

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

### 6.1. Almennar treytir

6.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2. Henda umhvørvisgóðkenning er galdandi fyri alt virksemi, eisini brunnbátar, bilar og virksemi hjá veitarum, meðan teir arbeiða á smoltstøðini.

6.1.3. Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn góðkenning er fingin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.4. Allar sýnistøkur, kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.5. Allar sýnistøkur, kanningar, metingar av úrslitum og metingar annars verða goldnar av P/F Bakkafrost Farming.

6.1.6. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni.

6.1.7. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í løgtingslóg um umhvøvisvernd.

6.1.8. Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av.

6.1.9. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkenningin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.10. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2. Virksemi

6.2.1. Virksemið skal vera sum ávíst í umsóknini og tilfari, sum er sent seinni.

6.2.2. Mest loyvda framleiðsla sambært hesi góðkenning er til eina fóðurnýtsla á í mesta lagi 5.000 tons árliga.

6.2.3. P/F Bakkafrost Farming skal halda øll útlát so lág sum møguligt og skal í mest møguligan mun nýta bestu tøku tøknina (BAT).

6.2.4. Goymslur til útgerð, burturkast o.a. skal tryggjast soleiðis, at tað ikki fýkur, elvir til ampar ella er atvold til dálking í náttúruni.

6.2.5. Hølir, ið nýtt verða til goymslu av kemikalium o.ø., skulu hava tætt undirlag.

## 6.3. Útlát á sjógv

6.3.1. P/F Bakkafrost Farming skal brúka bestu tøku tøknina, BAT, fyri at minka um útlát og fyri at t.d. skarn og fóðurspill kann verða gagnnýtt.

6.3.2. Í seinasta lagi 1. apríl 2018 skal P/F Bakkafrost Farming senda Umhvørvisstovuni eina ætlan til góðkenningar, fyri hvussu og hvar spillivatn frá framleiðsluni verður leitt út, reinsihættir o.a..

6.3.3. Ætlanin skal innihalda upplýsingar um streymviðurskiftini á staðnum, og útleiðingina víst á korti, sum vísur dýpi, botnslag og botntopografi.

6.3.4. Munnin á útleiðingini skal í minsta lagi vera ein metur undir størstu fjøru.

6.3.5. Útleiðingin skal vera liðugt gjørd áðrenn virksemið byrjar.

6.3.6. P/F Bakkafrost Farming skal gera hóskandi kanning av botninum út fyri útleiðingina, t.d. við myndum, áðrenn virksemið byrjar.

6.3.7. Eina ferð um ári í trý ár, skal kanning gerast aftur við útleiðingina. Kanningin skal gerast seint á sumri og meðan fult virksemi er á smoltstøðini. Um nøkur sjónlig broyting sæst við útleiðingina, skulu bøtandi atgerðir gerast.

6.3.8. Eftir at Umhvørvisstovan hevur móttikið úrslitini frá kanningini saman við eini frágreiðing, tekur Umhvørvisstovan støðu til, um neyðugt er við fleiri kanningum.

6.3.9. Elvir spillivatnsútleiðigin til uppsavning av evnum ella tilfari í sjóvarmálanum ella á botni, til slóðir ella aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir gerast.

6.3.10. Nýtslan av reingerðarevnum, sóttreinsingarevnum og evnum at forða gróði, skal avmarkast mest møguligt, og miðast skal altíð eftir at brúka umhvøvisvinarligastu evnini.

6.3.11. Umhvørvisstovan kann krevja, at P/F Bakkafrost Farming ger kanningar av spillivatninum.

### 6.4. Útlát til luft

6.4.1. Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttan fyri øki hjá smoltstøðini.

6.4.2. Um ampar verða av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

6.4.3. Allar útleiðingar til luft skulu leiðast uppeftir og í minsta lagi ein metur yvir tak.

### 6.5. Umhvørvisstýring

6.5.1. P/F Bakkafrost Farming skal hava ein umhvørvisstýrisskipan, sum er samsvarandi viðurkendum skipanum.

6.5.2. Niðurskrivaðar mannagongdir skulu lýsa umhvørvismál fyri hvussu P/F Bakkafrost Farming kann minka um ávirkanina á umhvørvið, og hvussu tey kunnu røkkast. Mannagongdirnar skulu í minsta lagi lýsa:

- hvørji mál virkið hevur sett fyri at minka um útlát á sjógv og til luft, nøgd av burturkasti o.a.,
- hvussu og hvussu ofta málini verða mátað og endurskoðað,
- stýring av virkseminum,
- kanningar av útláti og viðlíkahaldi av reinsiskipanum,
- skrásetingar,
- skrásetingar av frávikum,
- fyribyrging av óhappum,
- upplæring av starvsfólkum sum hava ábyrgd av at fylgja mannagondunum.

6.5.3. Umhvørvisstýrisskipanini og tilhoyrandi mannagongdir skulu til ein og hvørja tíð kunna síggjast av Umhvørvisstovuni eftir umbøn.

6.5.4. Um umhvørvisstýrisskipanin ikki er góðkend av óheftum stovni , skal P/F Bakkafrost Farming hava serstakan skoðanarbólk, sum eftirmetir umhvørvisstýrisskipanina eina ferð um árið.

6.5.5. Allar kanningar skulu gerast meðan virksemið er ígongd.

6.5.6. P/F Bakkafrost Harvset skal skrivliga eftirmeta øll innanhýsis eftirlit og allar kanningar.

6.5.7. Um kanning ella frágreiðing vísir, at P/F Bakkafrost Farming ikki heldur treytirnar í hesi góðkenning, skal Umhvørvisstovan í seinasta lagi eina viku eftir at kanningin er gjørd og frágreiðingin fingin til vega, hava avrit av kanning ella frágreiðing, og í seinasta lagi 4 vikur eftir at kanningin er gjørd og frágreiðing fingin til vega eina ætlan fyri bøtandi atgerðir.

## 6.6. Rakstarskráseting/Umhvørvisfrágreiðing

6.6.1. Fyri hvørt ár skal P/F Bakkafrost Farming skráseta hesar upplýsingar:

- Tal og stødd av framleiddum smolti,
- Tal og stødd av deyðum smolti,
- Fóðurnýtsla,
- Fóðurfaktor,
- Nøgd og slag av brúktum heilivági og kemikalium,
- Nøgd og slag av reingerðaevni og sóttreinsingarevni,
- Nøgd av burturkasti, tilskilað slag og hvønn tað er latið til,
- Rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning,
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

6.6.2. P/F Bakkafrost Farmignskal skal á hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni eina umhvørvisfrágreiðing, sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingum,
- kanningarúrslit og viðkomandi tulking av úrslitum,
- dálkandi óhapp,
- avrit av árligu eftirmetingini av umhvørvisskipanini, og áseting av nýggjum umhvørvismálum,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a..

6.6.3. Umhvørvisfrágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. apríl í avloysandi ári.

## 6.7. Óhapp

6.7.1. Um dálking kemur fyri vegna óhapp[4] skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til at avmarka avleiðingarnar.

6.7.2. Óhapp, sum hava ella kunnu hava umhvørvisligan týdning, skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

6.7.3. Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

## 6.8. Burturkast

6.8.1. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[5], og skal latast móttakara við umhvørvisgóðkenning til at viðgera burturkast.

6.8.2. Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.8.3. Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

## 6.9. Óljóð

6.9.1. P/F Bakkafrost Farming hevur ábyrgd fyri, at bilar og bátar, sum hava beinleiðis tilknýti til virksemi á smoltstøðini, arbeiða so ljóðskynsamt sum gjørligt.

6.9.2. Ískoytið til óljóð[6] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | **mán – frí kl. 07 – 18**<br>**leyg. Kl. 07 - 14** | **mán – frí kl. 18 – 22**<br>**leyg. kl. 14 – 22**<br>**sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22** | **Allar dagar**<br>**kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð frá virkseminum 35 dB.

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).
[5] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007
[6] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

6.9.3. Um ampar verða av óljóði frá virkseminum, kann Umhvørvisstovan krevja óljóðsmátingar gjørdar, tó í mesta lagi einaferð um árið.

6.9.4. Um ampar verða av ljósum frá alivirkseminum, skulu neyðug tiltøk gerast.

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Heilsu- og innlendismálaráðið við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Klaksvíkar kommuna, klaksvik@klaksvik.fo
Kunoyar kommuna, kunoy@kunoy.fo
Heilsufrøðiliga starvsstovan, hfs@fo.fo
Landslæknin, foe@sst.dk